gult cyan magenta svart



# Stendur VÍF royndina

**Tríggir dystir verða leiktir í teimum báðum fremstu hondbóltsdeildunum um vikuskiftið, har kvinnurnar hjá VÍF kunnu taka eitt avgerandi fet móti gullmerkjunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Endaspælið í hondbóltslandskappingini er nú um at vera hálvrunnið, og hóast oddaliðini í báðum deildunum alsamt meira líkjast tveimum komandi føroyameistarum, so er framvegis rættiliga nógv, sum kann henda.

### Avgerandi løta í Vági

Ikki minst í kvinnudeildini man spenningurin vera stórur um vikuskiftið, tá VÍF fer til Vágs. Við einum sigri her, tykist tað mest av øllum sum um stríðið um FM-heitið bert verður ein avgreiðsluspurningur tað, sum eftir er av kappingarárinum.

Hinvegin verður alt at kalla púrasta opið, um so er, at VÍF ikki fær øll stigini við sær norður um suðuroyarfjørð. VB er í løtuni fimm stig aftanfyri, og at tær hava møguleikan at minka hetta niður í trý, er uttan iva við til at seta tær enn meira upp til dystin. Har umframt er einki at ivast í, at VB meira enn fegnar vilja hevna eyðmýkjandi stórtapið í steypafinaluni.

Um hendan uppgáva er ov stór ella ikki, er ilt at meta um, og ein partur av hesum spurningi er, hvussu væl VÍF er komið seg yvir missin av Nicoletu. Mikukvøldið tóktist hetta vera nøkur forðing, men mótstøðan tykist øðrvísi og sterkari, nú VB stendur hinumegin miðlinjuna.

Tveir aðrir dystir verða leiktir sunnudagin, og í báðm førum tykjast hesir at hava størri ella minni favorittar.

Lokaluppgerð er á Hálsi, har Kyndil og Neistin hittast, og vanligi vildi hetta verið at mett sum ein sera javnur dystur. Úrslitini hjá Kyndli seinastu tíðina hava tó ikki bent á, at so er, og tá Neistin samstundis hevur sýnt stóra framgongd síðani vetrarsteðgin, vil alt annað enn ein sigur til tær bláu vera at meta sum eitt í øllum førum óvæntað úrslit.

Í Klaksvík er Stjørnan enn størri favorittur, tá tær taka móti Tjaldri. Her er so eingin bøn – Stjørnan skal vinna fyri at hanga í, og tað vildi verið ein sensatión av teimum heilt stóru, um Tjaldur fær sett teimum forðingar í vegin hesum viðvíkjandi.


VÍF kann taka eitt avgerandi stig móti FM-heitinum sunnudagin

### Tríggir javnir

Hjá monnunum eru somuleiðis tríggir dystir á skránni um vikuskiftið, og í øllum trimum førum tykist ilt at spáa um, hvør tað verður, sum fer av vøllinum sum vinnari.

Kanska tykist greiðasti dysturin at vera á Skála, har VÍF fer á vitjan hjá steypavinnarunum. StÍF hevur havt alt annað góð úrslit í seinastuni, og móti Kyndli var eina løtu líkt til, at VÍF er um at finna góða spælið fram aftur. Har umframt eru liðini bæði ávíkavist styrkt og viknað, nú VÍF hevur fingið Daniel Rápa aftur, samstundis sum StÍF hevur mist John Petersen.

Í Havn verður lokaluppgerð millum stóru høvuðsstaðarliðini, og hetta tykist mest av øllum vera ein dystur um, hvør skal fáa eitt fet eyka í stríðnum um heiðursmerki. Tapir StÍF á Skála, kemur vinnarin av dystinum í Havn at standa í eini sera góðari støðu, nú bert ein dystur er eftir móti hvørjum av hinum.

Seinasti dysturin um vikuskiftið verður í Vestmanna, har KÍF hevur heimavøll móti Tjaldri. Hetta tykist vera uppgeðrin millum tey bæði sterkastu av teimum veikaru liðunum, og bæði kunnu tey av álvara siga farvæl við botnin, um tað eydnast at tryggja sigurin.

### Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 520 | 277 | 243 | 22 |
| 2 | VB | 5 | 4 - 0 - 1 | 448 | 336 | 112 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 5 | 3 - 0 - 2 | 459 | 375 | 84 | 16 |
| 4 | Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 369 | 365 | 4 | 11 |
| 5 | Kyndil | 5 | 1 - 1 - 3 | 394 | 470 | -76 | 8 |
| 6 | Sóljan | 5 | 0 - 0 - 5 | 293 | 460 | -167 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 0 - 1 - 3 | 232 | 432 | -200 | 2 |

### Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 548 | 411 | 137 | 22 |
| 2 | StÍF | 5 | 3 - 1 - 1 | 493 | 435 | 58 | 15 |
| 3 | Kyndil | 5 | 2 - 1 - 2 | 480 | 436 | 44 | 13 |
| 4 | Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 409 | 433 | -24 | 12 |
| 5 | KÍF | 5 | 2 - 1 - 2 | 399 | 445 | -46 | 8 |
| 6 | H71 | 6 | 1 - 0 - 5 | 461 | 518 | -57 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 0 - 1 - 4 | 396 | 508 | -112 | 4 |

### Dystirnir um vikuskiftið eru hesir

Kvinnur, sunnudagin:
14.30 Kyndil-Neistin
15.00 VB-VÍF
16.00 Stjørnan-Tjaldur

Menn, sunudagin:
16.00 Kyndil-Neistin
16.00 StÍF-VÍF
16.00 KÍF-Tjaldur

# Hvørt einasta sett er avgerandi fyri meistaraheitið

**Oddastríðið í bestu kvinnudeildini stendur og fellur við, um fremstu liðini megna at vinna øll settini, sum tær hava eftir at spæla**

FLOGBÓLTUR

Sunnudagin kl. 15.00 fara kvinnurnar hjá Mjølni at sita spentar og bíða og halda ondini, meðan Dráttur leikar móti TB í høllini á Giljanesi. Sum støðan í kappingini er í løtuni, liggur Dráttur til at vinna føroyameistaraheitið, men beint í hølunum á teimum liggur Mjølnir; bert eittans sett aftanfyri, men javnt í stigum. Men so leingi sum Dráttur vinnur 3-0, er einki hjá Mjølni at gera. So tær hava tørv á eini hjálpandi hond frá onkrum av hinum liðunum. Men ikki er heilt óhugsandi, at henda hjálpandi hond kann koma í dystinum millum Drátt og TB, tí TB hevur fyrr í ár gingið Drátti ein skarpan gang í teimum trimum dystunum, liðini hava spælt sínamillum: tveir dystir hevur Dráttur vunnið 3-1 og hin vann Dráttur 3-2. Og havandi í huga, at nervar kunnu hava sín avgerandi týdning í tílíkum dystum, so kann hetta gerast ein sera spennandi løta á Giljanesi sunnudagin.

Á Kambsdali spæla ÍF og Fleyr sunnudagin klokkan 13.00. Í løtuni tykist ÍF at vera greiður favorittur at vinna dystin. ÍF hevur vunnið tríggjar av teimum seinastu fýra dystunum tær hava spælt, samstundis sum Fleyr hevur tapt allar teir fýra seinastu dystirnar, tær hava spælt. Men tó so, eingin dystur millum hesi bæði liðini er í ár endaður 3-0, so um Fleyr kvinnurnar rættuliga kýta seg, so kann væl henda, at tær kunnu veita ÍF dygga mótstøðu. Sannroynd er eisini, at Fleyr hevur staðið seg betur í teimum trimum dystunum, sum higartil eru leiktir millum liðini. Fleyr hevur nevniliga vunni teir tveir og ÍF hin eina.

Fríggjakvøldið kl. 19 spældu ÍF og Mjølnir á Kambsdali, men úrslitið var ikki tókt, tá blaðið fór til prentingar.

### Heldur ÍF fast

Sunnudagin kl. 15 spælir oddaliðið ÍF móti Fleyr á Kambsdali. ÍF-maskinan tykist sera væl smurd í løtuni, so ilt er at síggja hvussu Fleyr kann kunna hótta ÍF. Men Fleyr er eisini púra óútrokniligt. Teir kunnu banka oddalið av okkurt vikuskifti, men so sjálvir fáa bank næsta vikuskifti móti onkrum “miðalhampa-liði”. Og tað er kanska mest tá eingin roknar við teimum yvirhøvur, at Fleyr er vandamikið, sum teir m.a. prógvaðu í fyrra dystinum teirra millum í Fuglafirði, tá Fleyr vann 3-1.

Í Sørvági spæla SÍ og Fram kl. 16. sunnudagin. Hjá SÍ hevur ikki hilnast so væl í ár, sum teir høvdu vónað, nógv orsakað av, at liðið sjáldan hevur verið mannað við sterkastu manningini. Og móti Fram verður neyvan so nógv at gera heldur. Fram er í einum góðum stima í løtuni og átti ikki at havt teir stóru trupulleikarnar móti SÍ. Undan dystunum sunnudagin er Fram á øðrum plássi, 3 stig aftanfyri ÍF.

### Dystir um vikuskiftið

Meistaradeild kvinnur:
02. mars
ÍF–Mjølnir kl. 19.00
04. mars
Dráttur–TB kl. 15.00
04. mars
ÍF–Fleyr kl. 13.00

Meistaradeild menn:
04. mars
SÍ–Fram kl. 16.00
04. mars
ÍF–Fleyr kl. 15.00

gult cyan magenta svart

# Vikuskifti

Nr. 44 • leygardagur • 3. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


Kári Svensson:
Várframsýningin er gluggin
síða 6-7

**ÚTSØLA. Árliga bókaútsølan byrjaði hin 21. februar. Sum verða man stóðu fólk við diskarnar og skoðaðu, meðan onnur longu høvdu krossað av í útsøluskránni, og bert komu framvið at heinta ársins bestu bókatilboð. Men hóast hon er donsk, útsølan, so eru føroysku tilboðini ikki heilt eiðasør**


*Bókaútsøla er í H.N.Jacobsens Bókahandli á Vaglinum í Havn. Føroysk bókaútsøla er bara triðja hvørt ár, meðan útsøla av donskum bókum er á hvørjum ári.*
*Mynd : Jens K. Vang*

# Bíligar bøkur

BØKUR
*Birgir Kruse*

Bøkur uppá tilboð. Bøkur á útsølu. Bíligar bøkur. Tað ljóðar ikki sørt niðursetandi. Í hvussu er hjá tí ella teimum, sum liva av at skriva. Og tey eru fá. Fá sum liva, men mong sum skriva. So ilt er at siga, um skriving er gott livibreyð her á landi.

Meðan føroysk bókaútsøla er triðja hvørt ár, so er donsk bókaútsøla á hvørjum ári. Hin føroyska var í fjør, og ársins danska fór av bakkastokki hin 21. februar.

Longu frá morgunstundini møttu fólk, væl fyrireikaði við bókaskránni í hondini. Væl fyrireikaði høvdu tey krossað av bestu tilboðini og tey skuldu nú bara heintast. Onnur hyggja, forvitnast og kunna seg við ársins útboð og tilboð. Keypa okkurt, soleiðis hissini.

Eyðkendi hugnaligi bókahandilin á Vaglinum í Havn, H.N.Jacobsens bókahandil, er við í ársins útsølu av donskum bókum.

Mest seldu og eftirspurdu bøkurnar eru handbøkur, ymsar mentunarligar bøkur og so bøkur, sum viðgera evni av meiri heimspekiligum slagi, sigur Nomi Johannessardóttir.

Nomi, sum er útlærd bókahandlari úr Gad’s Studieboglade í Århus, hevur seinastu trý árini starvast í H.N.Jacobsens Bókahandili.

»Mest selda og eisini so nógv mest eftirspurda bókin, er ein listarlig bók um Fridu Kahlo, sum Hayden Herrera hevur ritstjórnað og forlagið Fogtdal gevur út«, sigur Nomi. »Hetta er eisini tann bókin, sum eg fremst av øllum tilboðunum, hevði ynskt mær, skuldi eg sjálv valt«, sigur Nomi um bókina, sum so nógv ikki fáa, tí hon longu er uppseld frá forlagnum.

»Hetta er ein stór og ófatuliga flott bók«, sigur Nomi.

At Frida Kahlo eisini er ein kult-persónur hefti eg meg við miðskeiðis í 80’unum, tá Filmsfelagið vísti ein kubanskan film um hesa spennandi meksikansku listarkvinnu, sum fekk eini tvey hundrað verk frá hondini innan hon doyði 47 ára gomul í 1954.

Í aktuellu útsølubókini um Fridu Kalho er hópur av litmyndum og bókin fevnir um 272 blaðsíður.



*Frida Kahlo er mest selda danska útsølubókin*

Millum kókibøkurnar er tað eisini hitt meksikanska, sum dregur, heldur Nomi. Og so kinesiski kókikynsturin eisini. Í hesum bólki av handbókum, eru eisini fleiri bøkur um pappírsklipp seldar.

Av teim bókum, sum viðgera heimspekilig viðurskifti, eru fleiri ymsar. Men kvinnur spyrja mest eftir bókini hjá Robin Norwood, sum eitir *Daglige meditationer for kvinder, der elsker for meget*. Hetta er helst mest selda bókin í hesum bólki, sigur Nomi.

Ein áhugaverd staðfesting, nú altjóða kvinnudagurin, sum Elin Heinesen hugleiðir um á næstu síðu, er í nánd.

Millum mest eftirspurdu bøkurnar í Bókahandlinum á Vaglinum í Havn eru eisini skaldsøgan *Frost på udsatte steder* eftir Marianne Gade og endurminningarnar *Det skulle nødig hedde sig* eftir Lotte Tarp.

Hóast vit skulu bíða í tvey ár eftir næstu útsøluni við føroyskum bókum, finni eg longu nú mest áhugaverda tilboðið frá H.N.Jacobsens bókahandli. Tað er eitt gamalt lítið prangandi rit, prentað í 1946, 70 blaðsíður til støddar, sum fæst fyri fimm og tjúgu krónur.

Einasta frámerki er »Bókaprent Tórshavn 1946«. Frá søgugranskaranum Jákupi Thorsteinsson fái eg at vita, at Thorstein Petersen er útgevarin. Heitið á ritinum, sum enn finst í nøkrum fáum gulnaðum eintøkum, er *Upprit av munnliga orðaskiftinum í donsk-føroysku sendinevndini í Keypmannahavn januar-mars 1946*.

Áhugaverdur, og hóast meiri enn hálva øld gamal, stak aktuellur lesnaður. Í hvussu er væl hóskiligur afturvið sendingini hjá DR2, sum SvF eisini sendir í kvøld. Hon byrjar klokkan 19 og í samfullar tríggjar klokkutímar fer danska rásin av einslistum at kjakast við okkum føroyingar um fólkaatkvøðu og framtíð tjóðarinnar.

Lýst er við beinleiðis samrøðu – ella er alt bandað í advent? – við bæði løgmann og Nyrup. Spennandi, hvat teir hava at siga og um teir yvirhøvur møta. Hvør í sínum rikisparti. Annar í SvF klokkan 20:50 og hin hjá DR klokkan 21:25, okkara tíð.

So tá onnur ikki leggja upp til sovorðið kjak, so má eg ásanna, at einki er sum ríkisfelagsskapurin kortini. Meðan vit enn kalla nakað okkara tíð.

Gott Vikuskifti!


*Hóast altskyns góðar danskar bøkur, var besta tilboðið Birgir Kruse fann, føroyskt. 55 ára gamalt og skrivað á donskum. 70 gulnaðar blaðsíður fyri 25 krónur. “Upprit av munnliga orðaskiftinum í donsk-føroysku sendinevndini í Keypmannahavn januar-mars 1946”*